

Loyvið 008 (ljósareyða økið) er júst latið innaftur, og sostætt hava Statoil og OMV einki loyvi eftir í Føroyum. DONG hevur tó tvey loyvi longur syðri.

# Oljuleitiloyvi latið inn aftur - nú einans tvey loyvi eftir

**Jan Müller**

28.07.2015 - 11:49

Oljan.fo

Nú Statoil hevur latið inn sítt seinasta leitiloyvi á føroyska landgrunninum, er bert eitt útlendskt oljufelag eftir við leiitiloyvi í Føroyum, og tað er danska DONG.

Statoil hevur vegna loyvishavararnar í leitiloyvi 008 boðað frá, at tey lata loyvið inn aftur nú.

Leitiloyvi 008 varð latið í 2005. Í 2014 varð brunnurin 6104/25-1, eisini nevnt Súla/Stelkur leitimiðini, boraður við pallinum, West Hercules. Borað varð niður á 3.015 m. Spor av kolvetnum vórðu staðfest, men ikki rakstrarverdar nøgdir.

Loyvisøkið verður partur av økinum, ið fer at verða boðið út í komandi útbjóðingarumfari, sum ætlandi verður í 2017 stendur at lesa á heimasíðuni hjá Jarðfeingi.

Loyvishavarar í loyvi 008 vóru: Statoil (fyristøðufelag), DONG og OMV.

Eftir hetta er bara eitt felag, sum hevur leitiloyvi í Føroyum.Tað er DONG Energy, sum í løtuni hevur tvey leitiloyvi í landssyningshorninum av føroyska landgrunninum, nærhendis Marjunfundinum, sum varð gjørt í 2001.

DONG, sum í løtuni kannar seismikkin, ið er skotin í økinum, skal einaferð í 2016 gera av, antin tað vil bora ein brunn har ella lata loyvini innaftur.